# Kt í samskifti ímillum tveir 7. flokkar á tveimum skúlum

# - Trongisvágs skúla og Hvalbiar skúla.



KT-verkætlanaruppgáva
John Næs Berg
Heri Thorsteinsson

Kt-depilin
Juni 2004
Vegleiðari: Birgir Kruse

# Kt í samskifti ímillum tveir 7. flokkar á tveimum skúlum - Trongisvágs skúla og Hvalbiar skúla.

1. Endamál

2. Um flokkarnar

3. Stovna ráðstevnu

4. Ein at skriva saman við

5. Innihald í brøvum-etikkur

6. Ávegis eftirmeting

7. Kjatt

8. Fortreytir læraranna

9. Eftirmeting

10. Keldulisti

# 1. Endamál

Endamálið er at gera næmingarnar meinkunnugar í teldusamskifti við at nýta first-class.
Vónandi fer hetta eisini at menna skrivligu framseting næminganna.

Fyri at náa hesum endamáli ætla vit, at næmingarnir skulu læra at nýta brúkaranavn og loyniorð. Skriva og senda til ráðstevnu og ávísan móttakara.
Her verður eisini hugsað um viðheftar fílur – tekst og myndir.
Við tað, at kjatt má roknast sum náttúrligur partur av samskifti í dag, verður tað eisini tikið við.

Ætlan okkara er, at KT-depilin stovnar ráðstevnu til flokkarnar, sum næmingarnir samskifta ígjøgnum.
Samskiftið byrjar fyrst í novembur 2003, og hildið verður áfram til síðst í mars 2004.
Tað er eisini okkara vón, at hetta fer at eggja næmingunum at halda áfram við samskiftinum, tí tá teir koma í 10. flokk, koma allir at ganga í sama skúla/flokk, t.v.s. Tvøroyrar skúla.

Í kapittuli 2 fara vit at finna fakta um flokkarnar, ið skulu luttaka í verkætlanini.

## 2. Um flokkarnar

Næmingar í Hvalba

| Fornavn | Millumnavn | Eftirnavn |
|---|---|---|
| Allan | | Sveinbjørnsson |
| Asger | | Jensen |
| Ásur | | Poulsen |
| Barbara | | Olsen |
| Drós | | Poulsen |
| Durita | | Poulsen |
| Eilif | | Dimon |
| Erla | | Eyvindsson |
| Evald | | Norðberg |
| Lena | Lagfoss | Joensen |
| Niels | Peter | Holm |
| Óli | Jákup | Nielsen |
| Paulina | | Thomsen |
| Pætur | | Ellendersen |
| Rakul | Johanna | Nielsen |
| Súsanna | | Rasmussen |
| Tróndur | | Olsen |
| William | | Berg |

Næmingar í Trongisvági

| Fornavn | Millumnavn | Eftirnavn |
|---|---|---|
| Bjarni | | Brattalíð |
| Gunnar | T. í | Dali |
| Sjúrður | J | Ferjá |
| Bárður | | Hentze |
| Vivi | F. | Jespersen |
| Gundur | | Johansen |
| Petur | Mohr | Mortensen |
| Rakul | | Mortensen |
| Benjamin | | Petersen |
| Ása | J | Pólsdóttir |
| Jákup | Pauli | Poulsen |
| Rannvá | | Roest |
| Sunnvá | | Sørensen / |
| Marco | | Steinkross |

7. flokkur í Hvalba
Næmingatal: 18 = 8 gentur og 10 dreingir
Flokslærari: John Berg.

<u>Um flokkin</u>
Sum lærari kenni eg flokkin sera væl, tí eg havi verið flokslærari hjá teimum síðani 1.flokki av.
Eg havi havt flokkin nógvar tímar. Havi t.d. havt tey í føroyskum allan vegin og nú eisini í enskum. Havi harumframt havt tey í handaverki og list, og dreingirnar í ítrótti.
7.flokkur er størsti flokkur á skúlanum. Í flokkinum eru tveir næmingar, sum fáa stuðul vegna serligan tørv. Flokkurin hevur verið ein væl fungerandi flokkur higartil. Haldi eisini fakliga støðið vera á heilt góðari leið.
Víst verður til undirvísingarætlan skúlans, men umframt hetta skal stórur dentur leggjast á at steðga beinleiðis happing í flokkinum. Annars skal flokkurin vísa málsligan og høviskan atburð mótvegis lærarum og næmingum skúlans, og hetta eiga næmingarnir eisini at hava í huga, nú teir av álvara skulu út á alnótina.

7.flokkur í Trongisvágs skúla
Næmingatal: 14 = 5 gentur og 9 dreingir
Flokslærari: Sólrún Luid.

<u>Um flokkin</u>
Hetta er fyrsta árið eg undirvísi í Trongisvági, so av góðum grundum kendi eg ikki flokkin fyrr enn nú. Eg havi tey í støddfrøði, alis/evnafrøði og landalæru. Sambært teimum lærarum, ið hava havt flokkin í fleiri ár, verður sagt, at tey arbeiða væl saman sum ein flokkur. Í flokkinum eru tveir næmingar, sum fáa stuðul.

Við tí vitan vit nú hava um flokkarnar, fara vit í næsta kapittuli at greiða frá, hvussu vit ætla at upprætta eina ráðstevnu at samskifta ígjøgnum.

## 3. Stovna ráðstevnu

Beinan vegin tá skúlaárið byrjaði, varð farið undir at fyrireika arbeiðið.
Frá KT- deplinum fingu vit Birgir Kruse í Havn ávístan sum lestrarvegleiðara.
Vit vóru á vitjan hjá Birgiri fyrst í september 2003. Tosað varð um, hvussu samskiftið okkara millum skuldi vera. At ferðast norður um fjør fer við nógvari tíð fyri okkum suðuroyingar, so Birgir og vit báðir samdust um, at einki skuldi verið meira náttúrligt, enn at samskiftið okkara millum í størsta munin fór fram um alnótina.
Avtala varð gjørd við KT-depilin, so vit fingu eina ráðstevnu, t.v.s. at næmingarnir í báðum flokkunum, umframt John og Hera, fingu atgongd til hesa ráðstevnu.
Í 4. kapittuli ætla vit eisini at skipa so fyri, at næmingarnir út frá spurnarbløðum um ynski fáa møguleika at finna sær ein skrivifelaga.

## 4. Ein at skriva saman við

Eitt tað fyrsta, ið varð gjørt, var at kanna, hvussu atlit næminganna til teldur var, t.d um teir høvdu møguleika at brúka teldur í skúlanum og heima, og um teir høvdu møguleika at fara á internetið
Eitt spurnarblað varð gjørt, har vit royndu at kanna teirra telduvanar.
Umráðandi er at gera næmingunum greitt, at teir eiga at verða reiðiligir í sínum svarum, tí av royndum vita vit, at ofta verður gjørt gjøldur burturúr, tá svarast skal.
Ein spurningur, sum av røttum átti at staðið í spurnarblaðnum, kundi verið, um næmingarnir eru vanir at brúka FirstClass til at samskifta við. Vit hildu tó best vera at tosa við næmingarnar ístaðin - t.d. um ymisk forrit at nýta í brævaskifti og kjatti.
Tey flestu í Trongisvágs skúla høvdu hoyrt um FirstClass, og onkur hevði fingið útvegað brúkaranavn og loyniorð, men bara tvey høvdu gjørt brúk av tí. Niðurstøðan hjá okkum var tí, at neyðugt var at geva næmingunum vegleiðing í teimum vanligastu funktiónunum í FirstClass, hvussu loggar tú á, hvussu lesur tú post, hvussu sendir tú eitt bræv, hvussu sleppur tú inn á ráðstevnuna, og hvussu opnar/sendir tú eina viðhefta fílu.
Næmingarnir í Hvalbiar skúla hava brúkt FirstClass av og á í umleið eitt ár, so teir vita, hvat ein ráðstevna er. Teir duga allir at logga seg inn á teldukervið í skúlanum við loyniorði, teir hava fingið frá telduvørðinum, og teir duga eisini at logga seg inn á FirstClass við loyniorði, teir hava fingið frá KT deplinum.
Øll hava roynt at chatta, og so at siga øll hava sent og móttikið brøv, men neyðugt er tó at geva teimum vegleiðing í fleiri funktiónum í FirstClass, t.d. tað at viðhefta fílur.
Ymiskt var hvussu nógv næmingarnir dugdu at nýta telduna, møguliga hava vit yvirvurderað teirra evnir, men teir vístu beinan vegin sera stóran áhuga fyri hesi verkætlan.

Her eru svarini:

## Spurnarblað í samband við kt í 7. flokki í Hvalbiar skúla.

Dreingir Gentur

| | |
|---|---|
| **1. Aldur : ___ ár** | **13** |
| **2. Kyn : ___ genta**<br>**___ drongur** | **8**<br>**10** |
| **3. Hevur tú atgongd til teldu heima?**<br>**___ ja**<br>**___ nei** | **6 9**<br>**2 1** |
| **4. Hava tit internetsamband heima?**<br>**___ ja**<br>**___ nei** | **4 7**<br>**4 3** |
| **5. Brúkar tú internetið heima ?**<br>**___ ja**<br>**___ nei**<br>**um ja, til hvat ?** | **4 6**<br>**4 4**<br>***chatt/spæl/download – alt/spøl – spæli – ringitónar/chatt – chatt/spæli – chatt/sms***<br>**leiti eftir myndum – skrivi brøv – chatti - chatti** |
| **6. Hvussu nógva tíð brúkar tú á netinum dagliga ?**<br>**___ minni enn 1 tíma**<br>**__ 1-3 tímar**<br>**___ 3 tímar ella meira** | **4 1**<br>**3 6**<br>**1 3** |
| **7. Hvat gert tú á netinum ?**<br>**___ leiti eftir ymiskum**<br>**___ chatti**<br>**___ skrivi brøv**<br>**___ spæli** | **5 4**<br>**3 5**<br>**3 2**<br>**4 8** |
| **8. Hvussu ofta arbeiðir tú við teldu í skúlanum ?**<br>**___ minni enn 1tíma um vikuna**<br>**___ 1 – 3 tímar um vikuna**<br>**___ meira enn 3 tímar um vikuna** | **1 1**<br>**6 8**<br>**1 1** |
| **9. Hvat gert tú í teldutímunum í skúlanum?**<br>**___ skúlating**<br>**___ chatti**<br>**___ skrivi brøv**<br>**___ spæli** | **6 9**<br>**4 7**<br>**5 4**<br>**5 7** |
| **10. Arbeiða teldurnar nóg skjótt í skúlanum ?**<br>**___ ja**<br>**___ nei**<br>**___ veit ikki** | **2**<br>**2 7**<br>**4 3** |
| **11. Hvussu við atgongd til teldustovuna ?**<br>**__ fría atgongd**<br>**__ lærarin er við** | **18** |
| **12. Hava tit hvør sína teldu í teldustovuni ?**<br>**___ ja**<br>**___ nei**<br>**um nei, hvussu nógv eru so um hvørja teldu? ___** | **18** |
| **13. Hava tit teldur í flokshølinum ?**<br>**___ ja**<br>**___ nei** | **18** |

Um vit hyggja at, hvussu svarini hjá næmingunum í Hvalbiar skúla eru síggja vit, at av 18 næmingum hava 15 atgongd til teldu heima, og av teimum hava 11 atgongd til internetið. Allar genturnar, sum hava internet heima, gera brúk av tí, men av teimum 7 dreingjunum eru tað 6, ið brúka netið heima. Av teimum 6 dreingjunum chatta teir 4 t.v.s. 66%, meðan 2 av 4 gentum chatta, t.v.s. 50%. Fýra av dreingjunum spæla, meðan eingin av gentunum ger tað. Ein av gentunum leitar eftir myndum, og ein skrivar brøv.
Ein drongur downloadar, ein leitar eftir ringitónum, meðan ein sigur seg gera alt møguligt.
Um vit taka dagliga brúkið á netinum er fordeilingin soleiðis, at helvtin av dreingjunum brúkar ímillum 1-3- tímar. Ein brúkar meira enn 3 tímar, meðan 4 siga seg brúka minni enn 1 tíma. Hjá gentunum er fordeilingin næstan tann sama. Tríggjar brúka netið ímillum 1-3- tímar, ein meira enn 3 tímar, meðan hinar 4 minni enn 1 tíma dagliga.
Spurningur 5 og 7 falla so at siga saman t.v.s hvat tey brúka netið til, um tey eru heima ella, hvat tey brúka netið til í síni heild – svarini hjá bæði gentum og dreingjum eru so at siga eins í 5 og 7.
Tíðin, tey arbeiða við teldum í skúlanum, liggur hjá teimum flestu ímillum 1-3 tímar um vikuna, tó hava ein genta og ein drongur svarað meira, og ein genta og ein drongur minni enn 1 tíma um vikuna.
Sambært spurnarblaðnum kann sigast, at teldutímarnir í skúlanum verða mest nýttir í samband við undirvísing. 9 av 10 dreingjum, og 6 av 8 gentum brúka teldutímarnar til skúlating.Tað, at chatta, spæla og skriva, er javnt fordeilt.
Flestu dreingirnir vóru samdir um, at teldurnar í skúlanum arbeiða ikki nóg skjótt. 7 svaraðu nei, meðan 3 vistu ikki.
Av gentunum svaraðu 2 ja 2 nei og 4 vistu ikki. Haldi, vit út frá hesum kunnu lesa, at dreingirnir eru meira ónøgdir enn genturnar.

# Spurnarblað í samband við kt í 7. flokki í Trongisvágs skúla.

Dreingir Gentur

| | | |
|---|---|---|
| 1. Aldur : ___ ár | 13 ár | |
| 2. Kyn : ___ genta<br>___ drongur | 5<br>9 | |
| 3. Hevur tú atgongd til teldu heima?<br>___ ja<br>___ nei | <br>4<br>1 | <br>9<br> |
| 4. Hava tit internetsamband heima?<br>___ ja<br>___ nei | <br>3<br>2 | <br>7<br>2 |
| 5. Brúkar tú internetið heima ?<br>___ ja<br>___ nei<br>um ja, til hvat ? | <br>3<br>2<br> | <br>4<br>5<br> |
| 6. Hvussu nógva tíð brúkar tú á netinum dagliga ?<br>___ minni enn 1 tíma<br>__ 1-3 tímar<br>___ 3 tímar ella meira | <br><br>3<br> | <br>3<br>1<br> |
| 7. Hvat gert tú á netinum ?<br>___ leiti eftir ymiskum<br>___ chatti<br>___ skrivi brøv<br>___ spæli | <br>1<br>4<br>3<br>1 | <br>2<br>2<br>2<br>1 |
| 8. Hvussu ofta arbeiðir tú við teldu í skúlanum ?<br>___ minni enn 1tíma um vikuna<br>___ 1 – 3 tímar um vikuna<br>___ meira enn 3 tímar um vikuna | <br><br>4<br>1 | <br><br>8<br>1 |
| 9. Hvat gert tú í teldutímunum í skúlanum?<br>___ skúlating<br>___ chatti<br>___ skrivi brøv<br>___ spæli | <br>2<br>2<br>4<br>4 | <br>3<br>1<br>1<br>9 |
| 10. Arbeiða teldurnar nóg skjótt í skúlanum ?<br>___ ja<br>___ nei<br>___ veit ikki | <br>2<br><br>3 | <br>7<br><br>2 |
| 11. Hvussu við atgongd til teldustovuna ?<br>__ fría atgongd<br>__ lærarin er við | <br><br>14 | |
| 12. Hava tit hvør sína teldu í teldustovuni ?<br>___ ja<br>___ nei<br>um nei, hvussu nógv eru so um hvørja teldu? ___ | <br>14<br><br> | |
| 13. Hava tit teldur í flokshølinum ?<br>___ ja<br>___ nei | <br><br>14 | |

Um vit hyggja, hvussu svarini hjá næmingunum í Trongisvági eru, síggja vit, at av 14 næmingum hava 13 atgongd til teldu heima, og av teimum hava 10 atgongd til internetið. Allar genturnar, sum hava internet heima, gera brúk av tí, men av teimum 7 dreingjunum, eru tað bara 4, ið brúka netið heima. Hví so man vera, er ikki lætt at siga, men vónandi fáa vit svar uppá tað, tí ætlanin er umframt omanfyrinevnda spurnarblað eisini at gera eina samrøðu við næmingarnar. Kanska hevði verið best at tosað við teir allar. Tað, sum tosað verður um, skal vera í samband við spurnablaðið. Á tann hátt fáa vit helst eina betri mynd av telduvanumum hjá næmingum í 7. árgangi. Av teimum sum brúka internetið heima, er tað javnt býtt millum dreingir og gentur, hvat gjørt verður. Allar genturnar chatta, og tær flestu skriva brøv, meðan bara ein leitar eftir upplýsingum - hvørjum kemur ikki fram av spurnarblaðnum, men tá vit fara at hava munnligar samrøður, fæst nokk greiða á tí. Tað kemur týðiliga fram, at genturnar brúka meira tíð á netinum enn dreingirnir.Orsøkin man vera ymisk áhugamál teirra.
Tíðin, næmingarnir arbeiða við teldum í skúlanum, liggur millum 1-3 tímar um vikuna, tó hava ein genta og ein drongur svara meira, tað skyldast nokk, at tvey eru úti til stuðul nakrar tímar um vikuna, og tá verður teldan nógv nýtt.
Hvat teldan hevur verið og verður nýtt til í skúlanum er ymiskt. Sambært spurnarblaðnum kann ikki sigast, at hon verður nógv nýtt í samband við undirvísing, tí allir dreingirnir svara, at teir brúka hana til spæl. 3 dreingir og tvær gentur brúka hana til skúlasetning. Her er avgjørt nakað, vit sum kt-vørðar og vegleiðarar eiga at tosa um.

Við tað, at næmingarnir ikki kenna hvør annan, hildu vit tað verða rætt at gera eitt spurnarblað við nøkrum viðkomandi spurningum. Hesir spurningar verða vónandi ein hjálp, nú skrivifelagin skal veljast.

| | |
|---|---|
| **Ein at skriva saman við. @ Hvalba-Trongisvágur** | |
| **Trýst á spurningin, sum tú skalt svara uppá.** | |
| **1. Hvat er fulla navn títt ?** | **1.** |
| **2. Hvørjum skúla gongur tú í ?** | **2.** |
| **3. Hvussu eitur tað, har tú býrt ?** | **3.** |
| **4. Hvussu gamal/gomul ert tú ?** | **4.** |
| **5. Nær hevur tú føðingardag ?** | **5.** |
| **6. Hvat er stjørnutekin títt ?** | **6.** |
| **7. Hvønn hárlit hevur tú ?** | **7.** |
| **8. Hvønn eygnalit hevur tú ?** | **8.** |
| **9. Hvat er títt eydnistal ?** | **9.** |
| **10. Hvat er yndislitur tín ?** | **10.** |
| **11. Hvør er tín lívrættur ?** | **11.** |
| **12. Hvørji eru tíni áhugamál (frítíðarítriv) ?** | **12.** |
| **13. Samlar tú uppá nakað ?** | **13.** |
| **14. Hvønn ítrótt dámar tær?** | **14.** |
| **15. Hvønn ítrótt gongur tú til ?** | **15.** |
| **16. Ert tú limur í nøkrum ítróttarfelag ?** | **16.** |
| **17. Hevur tú nakað kelidýr ?** | **17.** |
| **18. Hvørja lærugrein dámar tær best í skúlanum ?** | **18.** |
| **19. Hvør er besta bók, tú hevur lisið ?** | **19.** |
| **20. Hvønn rithøvund dámar tær best ?** | **20.** |
| **21. Hvat er besti filmur tú hevur sæð ?** | **21.** |
| **22. Hvør er tín yndissjónleikari ?** | **22.** |
| **23. Hvønn tónleik dámar tær best ?** | **23.** |
| **24. Hvørji eru tíni idol ?** | **24.** |
| **25. Hvørji ljóðføri spælir tú uppá ?** | **25.** |
| **26. Hvørja sjónvarpsrøð dámar tær best ?** | **26.** |
| **27. Hvørja rás dámar tær best í sjónvarpinum ?** | **27.** |
| **28. Hevur tú fartelefon ?** | **28.** |
| **29. Hvat er títt hægsta ynski ?** | **29.** |
| **30. Hvat arbeiði kundi tú hugsað tær í framtíðini ?** | **30.** |
| **Tá ið tú hevur svarað øllum spurningunum leggur tú skjalið inn á ráðstevnuna.** | |
| **Send til Ráðstevnuna** | |

Tá ið øll høvdu svarað upp á spurningarnar, vórðu teir lagdir á ráðstevnuna. Nú høvdu næmingarnir so høvi at lesa svarini hvør hjá øðrum. Fyri at lætta um hjá næmingunum printaðu vit síðani út øll svarini.
Síðani varð eitt nýtt spurnarblað gjørt, eitt fyri næmingarnar í Hvalba og eitt fyri næmingarnar í Trongisvági, har teir so kundu velja sær ein skrivifelaga út frá teimum upplýsingum, teir høvdu frá tí fyrra spurnarblaðnum.

## Hvalba

Næmingarnir í Hvalba fingu hetta spurnarblaðið, har teir fingu møguleika at velja ein at skriva saman við í 1., 2. el. 3. lagi. Vit gjørdu teimum tó greitt, at tað var ikki heilt vist, at tey sluppu at skriva júst við tí, tey høvdu valt sum nummar eitt, tí møguleiki er at fleiri velja tann sama, og fyrilit má eisini takast fyri valinum hjá teimum í Trongisvági.

**Navn:________________________________** **Hvalbiar skúli.**

**Eg ynski at skriva saman við:**

| **Næm. Trongisvági** | **Val næmingar í Hvalba** | | |
|---|---|---|---|
| **Navn** | **1. lagi** | **2. lagi** | **3. lagi** |
| **Ása** | **ED** | **DP** | **SR** |
| **Rakul** | **BO** | **SR** | **ÁP-AJ** |
| **Rannvá** | **EE-AJ-RN** | **PE-BO-PT-NPH** | **DP-DS** |
| **Sunnevá** | **DP-PT** | **DS-EE-AJ** | **PE-BO-RN-NPH** |
| **Vivi** | **ÁP-SR-DS-LJ** | **RN** | **PT** |
| **Bárður** | **ÓN** | **LJ** | **AS – TO** |
| **Gundur** | | | |
| **Gunnar** | **TO-NPH** | **WB-AS** | **EE** |
| **Jákup** | | | **LJ** |
| **Marco** | | **ÁP- ÓN** | **WB-ED** |
| **Petur** | | | **EN – ÓN** |
| **Sjúrður** | **PE** | | |
| **Benjamin** | **EN - AS** | **TO – ED** | |
| **Bjarni** | **WB** | **EN** | |

**Hetta er so valið hjá næmingunum í Hvalba sett upp í kynsbýti:**

| Næm. Trongisvági | Val næmingar í Hvalba | | |
|---|---|---|---|
| Navn | 1. lagi | 2.lagi | 3.lagi |
| Ása | ♂ | ♀ | ♀ |
| Rakul | ♀ | ♀ | ♂♂ |
| Rannvá | ♀♀♂ | ♂♂♀♀ | ♀♀ |
| Sunnevá | ♀♀ | ♂♀♀ | ♂♂♀♀ |
| Vivi | ♂♀♀♀ | ♀ | ♀ |
| Bárður | ♂ | ♀ | ♂♂ |
| Gundur | | | |
| Gunnar | ♂♂ | ♂♂ | ♀ |
| Jákup | | | ♀ |
| Marco | | ♂♂ | ♂♂ |
| Petur | | | ♂♂ |
| Sjúrður | ♂ | | |
| Benjamin | ♂♂ | ♂♂ | |
| Bjarni | ♂ | ♂ | |

Um vit nú fara at kanna eitt sindur, hvussu næmingarnir í Hvalba valdu, síggja vit, at av teimum 8 gentunum var eingin, sum hevði ein drong sum fyrsta ynski. Bara ein genta hevði ein drong sum 2. ynski, og tvær gentur høvdu ein drong sum 3.ynski.
Men, av teimum 10 dreingjunum høvdu tríggir eina gentu sum 1.ynski. Tríggir høvdu eina gentu sum 2. ynski og 4 eina gentu sum 3.ynski.

Næmingarnir í Trongisvági fingu hetta spurnarblaðið, har teir fingu møguleika at velja ein at skriva saman við í 1., 2. el. 3. lagi. Vit gjørdu teimum tó greitt, at tað var ikki heilt vist, at tey sluppu at skriva júst við tí, tey høvdu valt sum nummar eitt, tí møguleiki er at fleiri velja tann sama, og fyrilit má eisini takast fyri valinum hjá teimum í Hvalba.

**Navn:________________________________ Trongisvágs skúli.**

**Eg ynski at skriva saman við:**

| **Næm. Hvalba** | **Val næmingar í Trongisvági** | | |
|---|---|---|---|
| **Navn** | **1. lagi** | **2. lagi** | **3.lagi** |
| **Allan** | ÁP-PM | RR-SS-BP | VJ-BB |
| **Asger** | JP | | |
| **Ásur** | | MS | ÁP |
| **Barbara** | | VJ | |
| **Drós** | VJ-MS-SS | RM-GD | BP-BH |
| **Durita** | | | |
| **Eilif** | BP | ÁP | RM |
| **Erla** | RM | | |
| **Evald** | | | |
| **Lena** | | SF | JP |
| **Niels Petur** | GJ-BB | JP | |
| **Óli** | | | |
| **Paulina** | RR | | SS |
| **Pætur** | | | |
| **Rakul** | SF | BH | |
| **Súsanna** | BH | | GD- PM |
| **Tróndur** | | GJ | RR-SF |
| **William** | GD | PM-BB | MS-GJ |

**Hetta er so valið hjá næmingunum í Trongisvági sett upp í kynsbýti:**

| Næm. Hvalba | Val næmingar í Trongisvági | | |
|---|---|---|---|
| **Navn** | **1. lagi** | **2. lagi** | **3.lagi** |
| **Allan** | ♂ ♀ | ♂ ♀ ♀ | ♂ ♀ |
| **Asger** | ♂ | | |
| **Ásur** | | ♂ | ♀ |
| **Barbara** | | ♀ | |
| **Drós** | ♂ ♀ ♀ | ♂ ♀ | ♂ ♂ |
| **Durita** | | | |
| **Eilif** | ♂ | ♀ | ♀ |
| **Erla** | ♀ | | |
| **Evald** | | | |
| **Lena** | | ♂ | ♂ |
| **Niels Peter** | ♂ ♂ | ♂ | |
| **Óli** | | | |
| **Paulina** | ♀ | | ♀ |
| **Pætur** | | | |
| **Rakul** | ♂ | ♂ | |
| **Súsanna** | ♂ | | ♂ ♂ |
| **Tróndur** | | ♂ | ♀ ♂ |
| **William** | ♂ | ♂ ♂ | ♂ ♂ |

Hyggja vit at, hvussu næmingarnir í Trongisvági valdu síggja vit, at ein genta hevði ein drong sum 1. ynski. Tríggjar gentur høvdu ein drong sum 2.ynski og fýra gentur ein drong sum 3.ynski.
Tríggir drongir høvdu eina gentu sum 1.ynski. Tríggir høvdu eina gentu sum 2.ynski og fimm eina gentu sum 3.ynski.

Tá vit høvdu fingið spurnarbløðini inn aftur, settu lærararnir seg saman at gjøgnumganga svarini hjá næmingunum og samanlíkna ynskir teirra við tað tey svaraðu í spurnarblaðnum **Ein at skriva saman við @.** Av tí at fleiri høvdu somu ynskir og onkur var, sum eingin hevði valt at skriva saman við, varð í flokkunum tosað aftur og fram um tað keðiliga, at onkur ongan hevði at skriva saman við. Tíbetur visti hetta seg ikki at vera nakar trupulleiki. Allir næmingarnir vóru til reiðar at broyta valið, um tað gjørdist neyðugt. Samrøður vórðu gjørdar við nakrar einstakar næmingar, og alt var fingið upp á pláss í bestu semju.
Tað vísti seg sum um, at næmingarnir bara vildu sleppa í gongd.

Við tað, at tey eru 18 næmingar í Hvalba og 14 í Trongisvági, verða í summum føri tveir úr Hvalba noyddir at skriva við tí sama í Trongisvági.

Niðanfyri síggja vit so endaligu avgerðina, um hvønn næmingarnir í báðum skúlunum skuldu skriva saman við.

| **Næmingar Trongisvágur** | **Næmingar í Hvalba** |
|---|---|
| **Ása Jóhanna Poulsdóttir** | **Eilif Dimon** |
| **Rakul Mortensen** | **Barbara Olsen – Erla Eyvindsson** |
| **Rannvá Roest** | **Asger Jensen–Rakul Jóhanna Nielsen** |
| **Sunnevá Sørensen** | **Pauliana Thomsen – Durita Poulsen** |
| **Vivi Fríðgerð Jespersen** | **Súsanna Rasmussen-Drós Sveinsdóttir** |
| **Bárður Hentze** | **Óli Jákup Nielsen** |
| **Gundur Johansen** | **Tróndur Olsen** |
| **Gunnar T. í Dali** | **Niels Petur Holm** |
| **Jákup Pauli Poulsen** | **Lena Joensen** |
| **Marco Steinkross** | **Ásur Poulsen** |
| **Petur Mohr Mortensen** | **Evald Norðberg** |
| **Sjúrður Johann Ferjá** | **Pætur Ellendersen** |
| **Benjamin Petersen** | **Asger Jensen** |
| **Bjarni Brattalíð** | **William Berg** |

Í 5. kapittuli fara vit at siga eitt sindur um, hvussu vit ætla at greiða næmingunum frá um innihald og etikk í samskiftinum.

## 5. Innihald í brøvum - etikkur

Bæði skúlin í Trongisvági og skúlin í Hvalba hava reglugerð um, hvussu teldustovan/ teldubúnaðurin eigur at verða viðfarin í tí dagliga.
Um ikki hesar reglur verða yvirhildnar fær hetta fylgir fyri næmingin.
Nú næmingarnir skulu út á alnótina, er óivað nógv at taka støðu til.
Hóast tað so at siga er ógjørligt at vita, hvat hvør einstakur ger ella fer at gera á nótini, so eiga vit sum lærarar at royna at leggja tað besta í næmingarnar, so at hesin ótrúligi miðilin kann gerast teimum eitt gott amboð framyvir.
Ljótur málburður, ov víðgongdar hugsarnir og ónærisligt tilfar, eigur ikki at vera grundarlagið undir samskiftinum.
Hóast tú ikki sært tann tú samskiftir við, so eigur tú altíð at hugsa sum so, at tit sita andlit til andlits.
Sum tú ynskir onnur skulu vera ímóti tær, soleiðis eigur tú eisini at vera ímóti teimum.
Vit fara her at seta upp nøkur hugskot, ið vónandi verða til gagns.

<u>Í samband við ráðstevnuna:</u>

1. Vanda tær um málið – brúka ikki ljót orð.
2. Royn og set vakurt og rætt upp, tað tú skrivar – legg ikki í, um onkur hevur villur í sínum innleggi, tað kann henda fyri sjálvt tann besta.
3. Royn og halt teg til tað ráðstevnan leggur upp til - og bara tað.
4. Persónligt samskifti eigur ikki at finna stað á ráðstevnuni – brúka so heldur e-mail.
5. Halt altíð givnar avtalur.
6. Verð varin, tá ið tú svarar, so at tú ikki blandar (svar til sendara og svar til øll)
7. Skriva ikki við ov stórari skrift – hetta kann kennast ov áleypandi.
8. Send ikki ov stórar fílur, hetta rúgvar ov mikið á telduni og teldukervinum.
9. Royn ikki at hava ov víðgongdar hugsanir – minnst til, at øll á ráðstevnunu síggja, hvat tú skrivar.
10. Vátta hvør tú ert, tá ið tú leggur nakað á ráðstevnuna, so hini síggja, hvør hevur skrivað.
11. Verð altíð varin, hvønn tú letur navn títt til – øll eru ikki altíð tað, tey geva seg út fyri at vera. Her verður serliga hugsað samskifti uttanfyri Firstclass.
12. Ligg ikki altíð á ráðstevnuni, hetta kann kennast forargiligt fyri onkran
13. Brúka smile-teknini
14. Royn og ver lítillátin, tað skaðar ikki.

<u>Í samband við e- mail</u>

1. Vanda tær um málið – brúka ikki ljót orð.
2. Skriva stutt og greitt.
3. Royn og set vakurt og rætt upp, tað tú skrivar – legg ikki í,
   um onkur hevur villur í sínum innleggi, tað kann henda fyri sjálvt tann besta.
4. Halt altíð givnar avtalur.
5. Verð varin, tá ið tú svarar, so at tú ikki blandar (svar til sendara og svar til øll)
6. Skriva ikki við ov stórari skrift – hetta kann kennast ov áleypandi.
7. Send ikki ov stórar fílar, hetta rúgvar ov mikið á telduni og teldukervinum.
8. Send ikki til fleiri, sum tú ikki kennir, hetta rúgvar og tyngir kervið ov nógv.
9. Vátta hvør tú ert, so hini síggja, hvør hevur skrivað.
10. Brúka smile-teknini.
11. Royn og ver lítillátin, tað skaðar ikki.

Innihald í brævasamskiftinum

1. Skriva um teg sjálvan.
2. Skriva um heystfrítíðina.
3. Skriva um tíni frítíðaráhugamál.
4. Skriva um skúlagongdin í jólamánaðinum.
5. Jóalfrítíðin.
6. Taka/viðgera og senda myndir.

Vit ætla í komandi kapittuli at gera eina ávegis eftirmeting, har næmingarnir eisini hava møguleika at koma til orðanna.

## 6. Ávegis eftirmeting.

Nú vit eru komin so væl áleiðis halda vit, at tað er rætt at hava eitt innanhýsis eftirmetandi samskifti millum lærarar og næmingar, har næmingarnir í skrift fáa møguleika at koma við teirra hugsan um gongdina higartil.
Vit hava niðanfyri gjørt eitt spurnarblað, har næmingarnir dulnevndir hava møguleika at siga sína hugsan.

Vit seta tær hervið nakrar spurningar um, hvat tú heldur um gongdina í verkætlanini higartil.
Royn við stuttum, greiðum setningum at siga tíni hugsan.
Gev tær góða tíð.
Tú skalt avgjørt ikki vera bangin fyri at koma við negativum frágreiðingum, um tú heldur tað verða neyðugt, tí bert við ærligum svarum hava vit lærarar møguleika at bøta um tað, sum kanska ikki var nóg gott.

Hvat heldur tú um:

1. Skriva um teg sjálvan – eitt sindur um meg – ein at skriva saman við?
2. Heystfrítíðin?
3. Frítíðaráhugamál míni?
4. Skúlin í jólamánaðinum?
5. Jólafrítíðin?
6. Myndagerð, tað at senda myndir á ráðstevnuna?
7. Hvat heldur tú um gongdina higartil?
8. Hevur tú okkurt hugskot um, hvat vit eiga at gera í næstum?
9. Hvat hevur tær dámað at verið við í hesi verkætlan – grundgev fyri tí?
10. Annað?

Takk fyri svarini, Heri og John.

## Her eru so nøkur av svarunum.

1
Mær dámdi sera væl, at vit kundu læra tey á Tvøroyri betur at kenna.
Sera stuttligt, tí nú hava vit samband við ein annan flokk. Stuttligt at skriva saman við einum, sum hevur somu áhugamál sum eg. Eisini kenni eg øll, tá vit koma at ganga í sama flokki í 10. á Tvøroyri.
Tað er stuttligt at fáa eitt sindur at vita um onnur og skriva um seg sjálvan.
Tað er eitt sindur merkiligt, at tey á Tvøroyri eta bara karrybollar.
Tað er stuttligt at vita eitt sindur um hini, og mann hevur ein at skriva saman við.
Eg haldi, at tað er fínt, at vit skriva um okkum sjálvi, tí so fáa hini at vita, hvussu persónurin er, og so kann mann velja ein at skriva saman við.
Tað var t.d. stuttligt at vita hvørja ítróttatgrein tey dáma.
Eg haldi, tað er fínt, at mann lærir um, hvat onnur dáma at gera í frítíðini.

2
Áhugavert at vita, hvar onnur fara at ferðast.
Tað er gott, at vit kunnu fortelja øðrum, hvat vit gera í heystfrítíðini, og tað er ikki sikkurt, at vit gera tað sama sum tey.
Eg haldi, at vit skrivaðu minni enn tey á Tvøroyri um heystfrítíðina, men eg haldi at tað er betur at skriva minni, annars er tað so leingi at lesa.
Tað er fínt at vita, hvat hini gera í heystfrítíðini, um tey eru uttanlands, ella um tey eru heima.
Fínt, tí tá fær mann at vita, hvat hini hava tikist við í heystfrítíðini.
Stuttligt at vita, hvat tey á Tvøroyri høvdu gjørt í síni heystfrítíð.
Tað kundi verið eitt sindur meira um heystið, t.d fletting.

3
Spennandi at vita hvat onnur gera í frítíðini, og hvat tey spæla.
Dreingir og gentur hava ikki somu áhugamál. Dreingjum dáma bilar,motorsúklur, rock og rapp musik. Gentum dáma alt møguligt annað.
Fínt at skriva um frítíðaráhugamál, ti so fáa vit at vita, hvat tey á Tvøroyri gera til dagligt.
Stuttligt at vita hvat tey gera í frítíðini og teirra áhugamál.
Tað var fínt at vita, hvat hini gera í frítíðini.
Stuttligt at vita hvat onnur gera.
Tað fingu vit jú at vita, tá vit skuldu skriva um okkum sjálvi. Soooo!!! Tað var eitt sindur býtt.

4
Stuttligt at vita hvat hini gera.
Skúlin er næstan líka allastaðni í Føroyum. Øll pynta stovuna, og so fær mann ikki so nógv skúlating fyri.
Tað er eitt fínt evni at skriva um.
Tað er eitt fínt evni, tí so veit mann, hvat munurin er á Tvøroyri og í Hvalba.
Fínt, tí so fáa hini at vita, hvat hinir næmingarnir gera í skúlanum á jólum.
Àhugavert at fáa at vita hvussu tey fyrireika seg til jólatræið og ikki gera tað sama sum vit.
Tað var gott at vita, hvat tey gera í desembur mánaða.

5
Gott at fáa at vita, um tey gera tað sama sum vit.
Øll eru saman við familjuni, og so koma eisini onnur at vitja og øll eru glað.
Higartil tað besta at skriva um, tí aftaná jólafrítíðina hevur mann so nógv at fortelja um.
Stuttligt at fáa at vita hvat onnur gera i jólafrítíðini.
Tað var fínt, tí so fáa hini at vita hvat onnur hava upplivað á jólum.
Stuttligt at fáa at vita hvørja jólagávu tey vóru glaðast fyri, og hvussu leingi tey høvdu verið uppi nýggjársaftan.
Tað var eitt sindur býtt, tí tað er næstan allastaðni tað sama í jólaferiuni.

6
Stuttligt at vita hvussu tey síggja út, og um vit hava sæð tey fyrr.
Nú síggja vit hvønnannan á myndum, men vit hava sæð fleiri, tá ið vit hava verið á Tvøroyri.
Um eg skal vera erlig, so hevði tað verið nógv betur at koyrt bíløtini, sum Per á Hædd tók, tí næstan øll hini, sum vit tóku sjálvi vóru ljót, uttan hjá onkrum drongi.Tað var eitt roks at senda myndirnar. Annars var tað stuttligt at síggja hini, men rotið at senda av sær sjálvum.
Eg haldi, at tað er eitt stríð og tekur ov leingi at koma inná nøkur biløt, tí tey eru so stór, men tað er fínt at mann kann síggja biløt av teimum.
Gott hugskot at senda myndir á ráðstevnuna, tí so veit mann, hvussu tann sær út, sum mann skrivar saman við.
Eitt sindur ringt at fáa myndina avstað - annars stuttligt.
Fínt, ti so sær mann, hvørjum mann skrivar saman við. Men teldurnar arbeiða alt ov seint, og tað tók eina góða løtu at opna bíløtini.

7
Haldi tað gongur fínt.
Eg haldi, at hon hevur verið góð.
Gongdin higartil er fín uttan tað, at vit eru alt ov sjáldan inni á ráðstevnuni.
Tað er fínt, men teldurnar arbeiða ov seint, men eg haldi, tað er gott at hava samband við ein annan klassa.
Eg haldi tað gongur fínt higartil.
Hon er fín.
Góð, men vit áttu at verið minst eina ferð um vikuna inni í teldurúminum í samband við hesa verkætlanina.

8
Nei.
Einki hugskot.
Vit áttu at skriva um okkurt, sum flokkurin gjørdi saman t.d. tá ið vit máladu tunnurnar til tunnusláingina.
Veit ikki.
Nei, eg havi einki tíverri.
Nei.
Páskafrí og føstulávint, hvussu tað verður fyririekað til føstulávint.

9
Sera væl, tí nú eri eg komin at kenna onnur sum eisini ganga í 7. flokk aðrasteðs.
Væl, tí tað hevur verið spennandi.
Eg havi dámt tað gott, tað hevur verið fínasta slag.
Gott,tað hevur verið fínt at havt samband við ein annan klassa.
Mær hevur dámað væl at verið við í hesi verkætlan, tí so fær mann óivað nakrar vinir afturat.
Mær hevur dámað tað gott.
Vit kundu farið á vitjan á Tvøroyri ella til tann, vit skriva saman við.

10
Nei.
Nei.
Tað einasta, sum kundi verið betur var, at teldurnar arbeiddu skjótari, men annars alt í fínasta slag.
Nei.
Veit ikki.
Nei.
Hetta er eitt gott hugskot og gott funnið uppá.

Fyri ikki at at vera ov drúgvir, er omanfyristandandi so svarini vit hava valt at taka við.
Hesi halda vit geva eina heildarmynd av meting næminganna um gongdina higartil.
Í 7. kapittuli fara vit at viðgera áhugaverda evnið kjatt.

# 7. Kjatt

Sum eitt av aðalmálunum í endamálsorðing okkara varð sagt, at henda verkærlan skuldi verða við til at menna skriviførleika næminganna. Tí hildu vit, at tað var upplagt, at rúm eisini var til, at næmingarnir fingu møguleika at kjatta.
Á netinum er ørgrynna av møguleikum at leita seg inn á kjattkanalir, har tú kanst samrøða í skrift um allan heim. Á allarflestu av hesum kanalum er tú anonymur, tú fært tær eitt “nickname”, og kann so skriva við hvørjum tú vilt, uttan at geva til kennar hvør tú ert.
Á FirstClass er eisini møguleiki at kjatta, men munurin er tann, at á FirstClass brúkar tú títt kristna navn.
Í flokkunum hjá okkum verður bara FirstClass brúkt, tá tey eru í skúlanum.
Hvat gera tey so eftir skúlatíð?
Nakrar gentur siga, at tær kjatta aðrastaðni eftir skúlatíð. Orsøkin til tað er, sum tær sjálvar siga, at tað eru so fá á FirstClass eftir skúlatíð.
Tá vit so spyrja, um orsøkin ikki eisini kann vera, at tær kunnu vera anonymar, siga tær allar við ein munn nei.
Hvussu við stavseting tá tit kjatta?
Vit ansa kanska betur eftir, tá vit kjatta á FirstClass.
Hvør kjattar við hvønn?
Er tað kynið, ið avger hvønn tú kjattar við?
Genta/genta - genta/drongur - samleiki og kyn
“Tá vit tosa um samskifti á netinum t.d. kjatt, er tað galdandi, at ongar av teimum gomlu og hevdvunnu samleikafaktorunum eru til staðar.
Søguliga sæð, hevur man bygt samleikan út frá annaðhvørt familjuskapi, aðali, borgarskapi ella arbeiðarastætti, sum varð avgjørt longu í vøgguni. Ella samleikin knýtti seg at einum handverki t.d. sonur smiðin osv, men nú á døgum hava vit ikki hesar rammur fyri samleika longur.” (Birgir Kruse 2000)
“Vit vera fødd og hava bara ein samleika, sum vit eru fødd við: Kynssamleikin. Hann er púra greiður. Vit eru menn ella kvinnur, og tey flestu kunnu síggja tað á okkum. Men á alnótini, ella í cyberspace, hava vit ikki tann samleika meira. Tá kunnu vit vera tann vit vilja. Vit kunnu vera mótsatt kyn ella eldri enn vit í veruleikanum eru, ella vit kunnu vera tann, vit tráa eftir at vera, og ongin finnur út av tí, í hvussu so er ikki fyrr enn vit møtast andlit til andlit.” (Stuedahl 1998)
Sambært okkara kanning hava vit ikki merkt nakað serligt til, at næmingar okkara heldur vilja verða ókendir tá teir kjatta, soleiðis greiðir ein av okkara næmingum frá:
“Eg haldi at tað er fínt at kjatta, tí so fær man nógv at vita um tann, sum man kjattar við, og so kann man eisini fortelja eitt sindur um seg sjálvan.
Tað er best at chatta á FirstClass, tí so veit man, hvønn man chattar við.
Man kan chatta við vinir og fólk, sum man kanska slett ikki kennir, so kann man fara at chatta við tey, og fáa eitt sindur at vita um tey, so fortelur man eitt sindur um seg sjálvan, man kann senda eina mynd av sær, og so tá ið man fer í telduna, kann tað vera at tey koma at kjatta við teg aftur.
Um tey hava fartelefon, kann man spyrja um telefonnummarið, so kann man sms´a við tey, tá man ikki er í telduni”.(drongur 13 ár)

Er nakað samband millum hvar tú býrt, í einum stórum samfelag ella einum lítlum, sum avger hvussu tú gevur teg til kennar á netinum, brúkar tú títt kristna navn, ella brúkar tú navnið hjá einum øðrum. Sambært tí Stuedahl (norsk) sigur, er tað meira vanligt at geva seg út fyri onkran annan enn tann tú í veruleikanum er. Samanbera vit hesa útsøgnina við tað okkara egnu næmingar siga, síggja vit stóran mun. Tað er bara einstakir næmingur, ið geva seg út fyri onkran annan, enn teir í veruleikanum eru. Út frá hesum kundi verið freistandi at sagt, at tað er munur á, hvussu atburðurin hjá teimum, ið búgva í einum stórum samfelag er og teimum, ið búgva í einum lítlum samfelag. Ella er møgulig broyting farin fram, nú internetið hevur verið atkomiligt í so nógv ár?
Í seinastuni hava nógvar avdúkingar um barnaporno verið. Í flestu førum eru tað menn, ið fáast við hetta ódámliga ítriv - ikki nakar ávísur aldursbólk. Men kvinnurnar smæðast heldur ikki burtur í hesum. Hetta gongur fyri seg fyri størsta partin á alnótini.
Tí halda vit, at tað er alneyðugt hjá okkum at greiða teimum ungu frá ongantíð at uppgeva navn, bústað og aldur. Vit vilja hervið vísa til: www.skulin.fo/trygd .

## 8. Fortreytir lærarananna.

Hvørjar fortreytir krevjast so av teimum lærarum, ið ætla sær undir eina tílíka verkætlan?
Fyrst er at siga, at teir helst mugu hava tað, ið svarar til KT-KORT fólkaskúlans.
Eitt, ið eisini hevur alstóran týdning er, at tú dugir at fáast við digitalar myndir, tað veri seg við fototóli og við viðgerð í telduni.
Um ein kanska ikki kennir seg heilt á tryggari grund, tá farið verður í gongd við eina tílíka uppgávu, eru hyggjuráðini at seta seg í samband við telduvørðin á skúlanum og fáa lagt eina ætlan, so at hesin er tøkur, um hjálp skuldi verið fyri neyðini.
Í okkara føri hevur hetta ikki verið neyðugt, tí vit báðir skuldu nú helst verið hampiliga væl fyri, nú útbúgving okkara sum telduvørðar er um at vera liðug.
Eitt, sum hevur lætt sera nógv um hjá okkum báðum í samband við uppgávuna, hevur verið, at vit hava havt møguleika at samskift og lagt til rættis heimanífrá via telduna- FirstClass. Tú hevur sitið fyri teg sjálvan og hevur ikki verið órógvaður av starvsfelagum ella næmingum, og hevur arbeitt, tá ið tú hevur verið upplagdur og havt tíð til tess.
Tað er eisini av alstórum týdningi, at útgerð/møguleikar lærarannа/skúlanna millum er so lík sum gjørligt, hetta ger arbeiðsgongdina nógv lættari.

Á teimum báðum teimum síðstu síðunum fara vit so at gera eina eftirmeting av allari tilgongdini.

## 9. Eftirmeting

Hvat siga vit nú, verkæltan okkara er liðug?
Fyrst er at siga, at eins og við flestu arbeiðum, er sera týdningarmikið at leggja alt væl til rættis. Lærararnir eiga at geva sær góðar stundir at gjøgnumhugsa ætlanina. Skilagott er at seta alt upp so neyvt sum gjørligt, so sleppast kann undan alt ov nógvum tillagingum á vegnum.
T.d. er sera umráðandi at hava eina neyva tíðarætlan, og at bundnar avtalur verða hildnar. Eisini er av stórum týdningi at kunna næmingarnar sera væl um tað, teir skulu í gongd við í góðari tíð. Hetta hevur í okkara føri víst seg at geva úrslit. Næmingarnir hava havt tíð at sodna tað, ið koma skal, og hava kent seg tryggari/róligari ígjøgnum arbeiðsgongdina.
Um nú avtalur ikki kunnu haldast t.d. vegna sjúku, eigur hetta at vera kunngjørt á ráðstevnuni sum skjótast, so at næmingarnir ikki fáa ta fatan, at alt ikki verður tikið í álvara.
Áðrenn farið verður í gongd eigur eisini at verða kannað, at umstøðurnar hjá luttakarunum á báðum skúlum eru so eins, sum tað nú einaferð ber til.
Av tí at næmingarnir í 7. flokki ikki hava nakra lærugrein, ið eitur teld burturav, hevur verið neyðugt at brúka tímar, sum tað nú einaferð hevur ligið fyri. Lættari hevði verið, um t.d. ein ella tveir tímar um vikuna høvdu verið fastlagdir til hesa lærugrein.
Sum nevnt undir førleika lærarann, er skilagott at hava neyvt samstarv við telduvørðin á skúlanum. Annars er lætt hjá einum lærara, ið hevur flokkin nógv at taka sær ta neyðugu tíðina eitt tílíkt arbeiði krevur. Eisini ber t.d. til at samstarva við læraran í føroyskum, har hesin so kann vegleiða og leggja næmingunum lag á. Tað veri seg bæði hvat framseting, innihaldi og stavseting viðvíkur. Hann kann lata næmingarnir skriva fyrst við hond tað, ið seinni skal út á nótina. Hetta hava vit havt góðar royndir av.
Í Hvalba er kervið sett upp soleiðis, at hvør næmingur hevur sítt egna heimabeiti, har hann so kann goyma alt sítt á, og so taka tað fram aftur, tá brúk er fyri tí.
Í Trongisvági er skipanin ikki sett upp á sama hátt, t.v.s. har er ikki møguleiki at goyma nakað inni hjá tær sjálvum.
Tí góvu vit næmingunum disklar, har teir kunnu goyma síni data á. Hetta fingu eisini næmingarnir í Hvalba boð um – gerst hervið ein náttúrligur partur í arbeiði teirra við teldum.
Vit hava varhugan av, at næmingarnir kendu seg privilegeraðar at vera við í hesi verkætlan. Sum heild hevur arbeiðið gingið væl, hóast børnum líkt- so var onkur, sum ikki gjørdi sær tann størsta ómakin – gjørdu heldur skjótt av fyri at sleppa at kjatta.
Tó vildu øll sleppa at skriva/senda meira til ráðstevnuna enn tað,vit høvdu lagt upp til – helst ikki ov nógvar bundnar uppgávur, - men okkurt tey sjálvi kundu velja.
Eitt, sum vit skjótt funnu útav var, at ístaðin fyri at næmingarnir sendu alt inn á ráðstevnuna sjálva, var best at gera undirmappur á hesa, so greiðari varð at finna tað, tú leitaði eftir.
Eisini greiddu vit næmingunum frá, hvussu teir uppá ein einfaldan máta via tilladelser kundu fáa sent post til onkran ávísan á ráðstevnunni. Vit lærdu teir eisini við historik at finna útav, nær og hvør hevði lisið tað, teir høvdu sent. Hetta hildu øll vera sera smart, og javnan kannaðu tey, hvør nú hevði lisið.
Í okkara føri halda vit, at sera gott er at hava fast samband við alnótina – alt gongur skjótari, og fellur nógv lættari – børn eru sum kunnugt brá av lyndi.
Eitt, ið eisini er av stórum týdningi er, at flokkarnir hava á leið sama næmingatal,
tí um onkur hevur ov nógvar skrivifelagar, kann hetta møguliga ovbyrja næmingin.
Vit hava ta fatan, at næmingarnir eru búnaðir almikið, og kenna seg nógv tryggari við telduarbeiði sum heild, síðani vit byrjaðu verkætlanina.

Tað, sum næmingarnir høvdu størstar trupulleikar av, vóru myndirnar, ið skuldu takast og sendast. Eitt gott hugskot hevði helst verið at havt eina gjølla undirvísing í hesum, áðrenn farið varð undir verkætlanina.
Kjatt hevur í dag avgjørt sína náttúrligu støðu í samskifti á alnótini, og kann kjattið vera sera mennandi.
Vit hava lagt til merkis, at næmingar, ið ikki eru væl fyri motoriskt – hava ilt við at føra pennin – hava hildið kjattið vera sera áhugavert. Helst tí, at teir hava kent seg tryggari við støðuna og sæð, at tað, teir hava skrivað, ikki sær so galið út hóast alt.
Alt kjattið í hesi verkætlan var á FirstClass t.v.s at øll kendu hvør annan. Næmingarnir vita tó, at møguleiki er at fara aðrar vegir at kjatta, har tú kann vera dulnevndur. Hetta í sær sjálvum er helst eitt tað mest áhugaverda við tykisheimi. Tó kunnu vit vísa til tað, sum vit hava nevnt í - Innihald í brøvum – etikkur - og kjatt, at tað er av týdningi, at tú er sera varin við at uppgeva navn og búðstað. Hugsað verður serliga um nógvu avdúkingarnar um barnaporno.
Vit halda, at sum heild hevur gingist væl. Tó høvdu vit smávegis trupulleikar í fyrstani við, at nakrir næmingar sluppu ikki inn á ráðstevnuna. Tosaðu við KT- depilin, og trupulleikin varð loystur við tað sama.
FirstClass er ein sera góð skipan til fremjan av eini tílíkari verkætlan, tí vit hava so at siga ongar tekniskar trupulleikar havt.
Undir verkætlanini hava vit givið næmingunum nógv spurnarbløð. Hetta halda vit hevur verið til sera stóra hjálp, tí á henda hátt hava vit loypandi kunnað loddað dýpið og hava sostatt altíð vitað, hvar vit hava flotið.
Áðrenn vit byrjaðu, greiddu vit næmingunum frá, at hóast samskiftið av og á kom at verða á einum persónligum støði, so høvdu vit lærarar møguleika at kanna tað, ið skrivað varð.
Vit halda, at vit við verkætlanini eru komnir at kenna næmingarnar øðrvísi og nógv betur. Hetta skuldi so bara verið mennandi bæði fyri lærarar og næmingar í tilrættalegging av undirvísingini framyvir.
Sum heild kann sigast, at støðið næminganna er hækkað.
Vit vilja enda við at siga, at hetta hevur verið sera áhugavert at fingist við, og lærarar eiga so avgjørt ikki at aftra seg at fara í gongd við eina tílíka ætlan.

# 10 Keldulisti

Kruse, Birgir “Faraway, so close” PD avhandling 1979
Stuedahl, Dagny í útvarpsprogrammi “Vetrarbreytin” Kruse,Birgir des.1998
Bach Jensen, Frank “Ringe i vandet” 1999
Bach Jensen, Frank og Ehrhorn,Kirsten “fra kaos til kontrol” 1997
Fromberg, Jytte “Banebryder II 2001
http://www.herskindskolen.dk
http://www.kaerbyskolen.dk
Egnar kanningar og samrøður við næmingarnar og lærararnar hjá flokkunum